# Go Go Blues koma heim aftur áðrenn G!

Søgur hava síðan Prix Føroyar finaluna gingið um, at Go Go Blues ikki fáa luttikið á G!, tí teir eru burturstaddir. Bæði G! Festivalurin og samskiparin hjá bólkinum avváttar hetta fyri planet.fo. GoGo Blues leita sær heim til Føroya allan vegin úr Kanada til tess at spæla á G! og á Ólavsøkukonsertinin. Blues hungrandi føroyingar hava sostatt góðar møguleikar at sløkkja sín blues tosta í summar.

GoGo Blues spæla blues-rock, og GoGo gera tað væl. Sangari, gittarleikari og fremstimaður í GoGo Blues er Uni R. Debess. Afturat sær hevur hann Föroya bestu rytmusektión: Arnold Ludvig og Rógvi á Rógvu á bassi og trummum.

GoGo hava givið eina fløgu út og, sum Prix vinnarar hava teir tryggjað sær studiotíð í viðurkendu Lundgaard Studios í Danmark, har teir seinni í ár fara at taka upp tilfar til næstu fløguna.

**Nud**



## Flogmekanikara lærlingur til Atlantic Airways

Kundi tú hugsað tær at sloppið í læru sum flogmekanikari? So hevur tú møguleikan nú.

Atlantic Airways tørvar ein flogmekanikara til teknisku deild, har høvuðsuppgávan er at hava eftirlit við og umvæla flogfør og tyrlur hjá felagnum. Í løtuni starvast 21 fólk á teknisku deild. Av teimum eru 15 mekanikarar, har 2 eru lærlingar.

Vit sóknast eftir einum ábyrgdarfullum og álítandi persóni, sum bæði er fyrikomandi og raskur. Tekniskur førleiki er ein fyrimunur.

Send eina umsókn, har tú sigur eitt sindur um teg sjálvan, hvat tú fæst við, og hvørjar arbeiðsroyndir, tú hevur. Fortel okkum, hví tú heldur, at akkurát tú skalt gerast okkara nýggi flogmekanikari.

Útbúgvingin til flogmekanikara tekur fýra og eitt hálvt ár. Umleið helvtin av tíðini er skúlagongd, sum gongur fyri seg í Danmark á Luftfartskúlanum í Dragør. Talan er um eina altjóða útbúgving, sum kann brúkast um allan heim. Tá ið útbúgvingin er liðug ber til at serútbúgva seg innan fyri ávís sløg av flogførum og tyrlum.

Fært tú kjansin, skalt tú byrja 1. august 2005. Merk umsóknina "flogmekanikaralærlingur" og send hana til: Atlantic Airways, att. William Smith, FO-380 Sørvági. Umsóknarfreistin er 11. juli.

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 140 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 234 milliónir krónur í 2004. Atlantic Airways hevur fýra flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Íslandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrlurnar røkja ferðasamband til útoyggjarnar, og bjargingartyrlan stendur á varðhaldi alt samdøgrið.

www.sansir.fo

ATLANTIC AIRWAYS

www.flyfaroe.com



www.sansir.fo

## Eitt virðiligt starv

Kaupthing søkir eitt fólk til ráðgeving og kundarøkt innan fyri virðisbrævaøkið.

Tín uppgáva verður at røkja sambandið við okkara viðskiftafólk. Ein umráðandi partur av arbeiðnum er at leggja skilagóðar og lønandi ætlanir fyri teirra íløgur. Umframt at ráðgeva teimum, vit longu samstarva við, skalt tú eisini leita upp hugsandi viðskiftafólk. Vit stremba eftir varandi viðurskiftum við okkara viðskiftafólk, og tí er álit eitt lyklaorð.

Til starvið krevst, at tú ert álitisvekjandi og megnar at skapa virðing um tín persón. Tú ert útvendur og samskiftir lættliga við øll. Tú dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt, tær dámar avbjóðingar, og tú hevur lætt við at seta teg inn í nýggj viðurskifti.

Tú hevur eina hóskandi hægri útbúgving og hevur stóran áhuga fyri íløgum í virðisbrøv. Góðar arbeiðsroyndir á økinum eru ein fyrimunur, men als eingin treyt. Enskt dugir tú væl, bæði í skrift og talu.

Vit kunnu bjóða tær eitt avbjóðandi starv á fakliga høgum stigi í einum dynamiskum felagi í støðugari menning. Tú kemur at uppliva ein góðan samstarvsanda í einum spennandi og mennandi umhvørvi, har altjóða møguleikarnir eru góðir.

Lønin verður eftir avtalu. Hevur tú annars okkurt at spyrja um, ert tú vælkomin at venda tær til Peter Holm, stjóra í Kaupthing í Føroyum.

Send eina umsókn innan 15. august til:

Kaupthing
Virðisbrævameklarafelag
Tinghúsvegur 14
Postboks 3090
FO-110 Tórshavn

Kaupthing er leiðandi innan fyri virðisbrævarøkt og vinnutænastur í Føroyum. Felagið røktar ognir fyri virki, stovnar og privatar íleggjarar og er fyrsta virðisbrævameklarafelag í Føroyum. Kaupthing er millum 10 teir størstu bankarnar í Norðurlondum umframt deildir í London, New York, Geneve og Luksemburg. 10 fólk starvast í Kaupting í Føroyum.

www.kaupthing.fo

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag